# Frumtíðarrit talgild á alnetið

**Fyrrapartin í gjár kundi Føroya Landsbókasavn avdúka úrslitið av verkætlan, sum Føroyar, Ísland og Grønland hava gjørt. Verkætlanin inniber, at nú ber til at síggja føroysk tíðarrit á alnetinum**



*Í gjár avdúkaði Føroya Landsbókasavn heimasíðuna við talgildum tíðarritum. Henda verkætlan hevur verið í gongd síðani ár 2000*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

TALGILD TÍÐARRIT
*Ingrid Bjarnastein*

Eini 20 fólk vóru komin saman í hølum hjá Føroya Landsbókasavni, tá teir mánadagin avdúkaðu úrslitið av eini verkætlan, sum hevur verið í gongd síðani ár 2000.

Martin Næs á Føroya Landsbókasavni bjóðaði fyrst vælkomin.

– Hetta er ein søgulig stund nú Landsbókasavnið saman við landsbókasøvnunum í Íslandi og Grønlandi, kann avdúka talgild tíðarrit, sum vit hava arbeitt við at fáa út á alnetið síðani ár 2000, segði Martin Næs millum annað.

Eisini segði hann, at hetta er ein vegamót í bókasavnssøgu. Tað at tað ber til, at bera tilfar víðari, sum vit vanliga bara hava standandi á hilunum hjá okkum gjøgnum alnetið.

### Ókeypis

Øll, ið hava hug, kunnu brúka talgildu tíðarritini hjá bókasøvnunum ókeypis. Í løtuni liggja góðar 33.000 blaðsíður tøkar á netinum. Tíðarritini talan er um eru flest øll eldri enn frá 1920, men tó eru einstøk undantøk gjørd.

Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í mentanarmálum, var komin at trýsta á tann grøna knøttin, sum avdúkaði nýggju heimasíðuna.

Verkætlanin er býtt upp í stig. Hetta fyrsta »byggistigið« gevur atgongd til alt tilfarið, sum er lagt út higartil. Seinni fer at bera til at leita meira nágreiniliga. Til dømis eftir persóns- ella staðarnavnið, og síðani hoppar leitiskipanin beinleiðis inn á síðurnar, sum hava hetta ávísa persónsella staðarnavn.

Føroysku tíðarritini eru Færingetidende, Føringatíðindi, Dúgvan, Fuglaframi, Búreisingur, Várskot, Oyggjarnar, Dúgvan og Fróðskaparrit.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð, bókasavnsvørur, hevur arbeitt við hesi verkætlan, sum tað føroyska umboðið. Fimm fólk hava annars arbeitt við at talgilda tíðarritini síðani ár 2000.

– Tilfarið avmarkar seg tíðarliga, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð. – Tíðarritini eru fram til 1920 og tey eru av slagnum fólk vanliga ikki hava atgongd til. Nøkur eru tó yngri enn frá 1920, og hava vit valt tíðarrit, sum hava verið nógv eftirspurd av fólki.

Sum er nú ber til at velja bókasavn, tað verið seg antin føroyskt, íslendskt ella grønlendskt, velja blað, árgang og blaðnummar.

– Hetta er sera umráðandi keldutilfar hjá søguskrivarum. Serliga upprunaritini Oyggjarnar og Dúgvan hava verið nógv umbiðin, og vit eru errin av at kunna veit fólki hesi tíðarrit í heilum líki. Tað er ógvuliga torført at finna eitt eintak av hesum tíðarritunum í heilum líki, tí tey hava ongantíð verið endurprentað, sum eitt nú Føringatíðindi.

### 2. byggistig

Næstu tíðina verða 500 nýggjar síður lagdar út um dagin, so talið av talgildum blaðsíðum fer at vaksa skjótt. Í komandi viku verður íslendsku tíðarritini tøk og í oktober mánaða eisini tey grønlendsku tíðarritini tøk.

2. byggistig verður í januar mánaða næsta ár, og tá er ætlanin at verkætlanin skal verða fullførd. Og er tað tá tað fer at bera til at leita meira nágreiniliga í ymsu greinunum.

Heimasíðan er tøk á fimm málum. Føroyskum, donskum, íslendskum, grønlendskum og enskum. Ein maskina í Reykjavík hevur avmyndað tíðarritini, har tey síðani eru løgd út, soleiðis, sum tey eru at síggja á heimasíðuni í dag.

– Tey stóru norðanlondini eru eisini í holt við at talgilda tíðarrit, og tá báðar verkætlanirnar eru lidnar, skulu tær tvinnast saman, sigur Martin Næs.

Tey stóru dagbløðini í føroyskum høpi, sum Sosialurin og Dimmalætting eru ikki við í nýggju talgildu skipanini hjá Landsbókasavninum. Hetta kemst av, at Landsbókasavnið heldur valdi smærri tíðarrit, men vent verður aftur til at talgilda dagbløðini einaferð seinni. Henda ætlanin er ikki slept enn, sigur Martin Næs.

Føroyingar hava ikki goldið nakað til hesa verkætlan enn. Hetta hevur verið ein partur av arbeiðinum hjá Arnbjørn Ó. Dalsgarð, sum er bókasavnsvørur. Íslendski parturin lá í fjør um 11 milliónir íslendskar krónur, sum er góð millión í føroyskum pengum. Verkætlanin er annars stuðlað av Nordinfo, sum er nevnd undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. Teirra íkast til verkætlanina var 350.000 krónur.

Annars eru talgildu tíðarritini at finna á heimasíðuni http://www.flb.fo/tidarrit ella http://www.tidarrit.fo



## Enn eitt brot á sjólógina

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin fór ein maður við báti av Klaksvík. Hann var ávirkaður av rúsdrekka. Tíbetur lá Brimil á fjørðinum, so gummibáturin hjá Brimli fór eftir manninum, sum verður ákærdur fyri brot á sjólógina.

Annars hevur verið stak friðarligt um alt landið um vikuskiftið.

Nøkur smá ferðsluóhapp hava verið í Eysturoynni fríggjadagin. Ein rúsdrekkakoyrari varð tikin á Eiði leygardagin og eisin var eitt sindur av húsaófriði.

Ein fráboðan var á politistøðini í Runavík um harðskap. Tað var ein maður, sum var sligin í andlitið til dansin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hann hevur verið hjá lækna, har hann hevur fingið staðfest skaðar, og kanningar fara nú fram í hesum málinum, sum helst verður tikið sum eitt harðskapsmál.

## 280 springarar í Vági

GRINDADRÁP
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarkvøldið løgdu 280 springarar beinini í Vági. Springararnir vóru býttir til sunnaru helvt av oynni.

Av politistøðini á Tvøroyri verður sagt, at drápið gekk væl, sjálvt um tað var um at gerast myrkt, og flestu springararnir gjørdu landgongd. Nakrir máttu tó dragast inn.



# Trygdarbeltið bjargaði trimum mannalívum

**Eitt ferðsluóhapp í Kaldbaksfirði sunnumorgunin kundi endað við eini syrgiligari vanlukku, tá ein bilur við trimum ungum fólkum fór niðan av vegnum, bóltaði runt og lendi á takinum í eini á. Bilurin kroystist saman og gjørdist vrak, men fólkini sluppu við onkrum bláum merki og eymum akslum av trygdarbeltinum, sum tey í dag takka fyri, at tey sótu í.**



*Løgreglan fekk boðini um ferðsluvanlukkuna í Kaldbaksfirði klokkan 04:38 sunnumorgunin. Ein hýruvognsførari koyrdi beint frammanfyri og var fyrstur á staðið. Hóast bilurin fórst rættuliga illa, fingu tey trý ungu fólkini ongan skaða. Tey sluppu sjálvi út úr bilinum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FERÐSLUVANLUKKA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Eg veit ikki, hvat hendi. Eg má hava durvað, og vaknaði ikki fyrr enn bilurin var komin út í vegjaðaran. Áðrenn eg fekk reagerað fór hann uppá bilverjuna, atuovernið, og bóltaði síðan runt í lagdini omanfyri vegin. Alt gekk so skjótt, og áðrenn eg visti av, lá bilurin á takinum niðri í lagdini við ánna. 22 ára gamli Jógvan Óli Ellingsgaard hyggur at bilinum, sum liggur samankroystur omanfyri vegin í Kalbaksfirði, umleið ein kilometur sunnan fyri tunnilsmunnan.

Tað er mánamorgun, og bara gott og væl eitt samdøgur síðan hann, gentan hjá honum og ein vinmaður lógu fastspent í bilinum við høvdinum niðureftir, og takkaðu fyri, at tey vóru á lívi.

Tey trý, Jógvan, gentan hjá honum, 19 ára gamla Maria Ulrika Schneider, og vinmaðurin, 20 ára gamli Jan McIntosh vóru sunnumorgunin á veg aftur til Havnar, eftir at tey høvdu verið til konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Teir báðir Jógvan og Jan, sita og práta frammanfyri, meðan Maria situr og svevur aftanfyri. Tónleikurin rungar úr hátalarunum. Men sum frálíður sovnar eisini Jan. Komin út úr Kalbakstunnlinum hevur Jógvan eisini durvað, og bilurin er farin niðan av vegnum.

– Eg sat og svav, men minnist, at eg vaknaði, í tí løtu at bilurin fer upp á bilverjuna, har hon sneiðir uppeftir, greiðir Jan frá. Í somu vaknar eisini Maria, og saman eru tey trý ungfólkini vitni til at bilurin bóltar runt, áðrenn hann endar niðri í eini á, umleið 20 metrar longur frammi. Tey greiða frá, at hesi sekundini fuku túsund tankar gjøgnum høvdið.

– Tá bilurin varð steðgaður rópti eg, um øll vóru á lívi, greiðir Jógvan frá. Jan svarar, men Maria svarar ikki beinanvegin. Teir hyggja afturum seg, og tá letur hon við seg koma. Hon er kløkk, men hevur tað gott. Tey hanga øll í trygdarbeltinum við høvdinum niðureftir. Takið á bilinum er trýst niður og trongt er. Eisini er nógv vatn úr ánni komið inn í bilin. Jan fær loyst sítt trygdarbelti, og sleppur út gjøgnum fremra síðurút høgrumegin. Jógvan fær togað nakkastúttuna út setrinum og fær síðan smoygt sær afturum og hann og Maria sleppa út gjøgnum síðurútin vinstrumegin aftanfyri.

– Tað var ein løgin kensla, tá vit vóru komin úr bilinum. Ein kundi kanska trúð, at vit vóru í sjokk, men vit blivu glað. Vit vóru øll á lívi, og eingin var komin til skaða, greiða tey frá. Maria minnist, at hon, meðan hon lá í bilinum, hoyrdi ljóðið av vatni, og eina løtu óttaðist hon, at tey møguliga vóru endaði á sjónum.

Ein hýruvognsførari koyrdi beint frammanfyri tey trý ungfólkini og sá tilburðin. Hann fekk beinanvegin boðað løgregluni frá, klokkan var tá 04:38, og var eisini fyrstur á staðið. Seinni greiddi hann teimum frá, at tey vóru tað fimta ferðsluvanlukkan, sum hann var komin fram á, bara í ár. Tey trý vóru so væl fyri, at øll kundu fara í sama sjúkrabil til Havnar, men tey sluppu skjótt heim aftur av landssjúkrahúsinum. Ballónin hjá løgregluni vísti eisini, at førarin ikki var ávirkaður av rúsdrekka.



*Tey trý, Jógvan Óli Ellingsgaard, Maria Ulrika Schneider og Jan McIntosh, sótu øll í bilinum, sum fór niðan av vegnum í Kalbaksfirði sunnumorgunin. Tey eru ikki í iva um, at trygdarbeltið bjargaði lívum teirra.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Trygdarbeltið bjargaði

Tey trý eru ikki í iva um, at trygdarbeltið er orsøkin til, at tey øll eru á lívi í dag, og ikki hava fingið mein. Jógvan greiðir frá, at hann, áðrenn tey fóru úr Havnini leygarkvøldið, mestsum í spølni segði við hini, at »nú mugu tit sita í trygdarbelti, tí tað bjargar lív«. At álvarin í orðunum bara fáar tímar seinni skuldi vísa seg fyri teimum, hugsaðu tey als ikki um tá. Tey vóru jú á veg til BoneyM konsert í Fuglafirði, lagið var gott, og tankarnir positivir.

Nú tey henda mánamorgun standa og eygleiða vraklutirnar av Ford Escort bilinum, sum tey høvdu lænt frá foreldrunum hjá Jógvani, hava tey trupult við at skilja, hvussu tað ber til, at tey eru sloppin so væl.

– Tað er ótrúligt, at man er komin livandi frá tí, sigur Jan, og Maria leggur afturat, at tað kann næstan ikki vera rætt. Líka síðan hendingina sunnumorgunin hava tey í tonkunum sæð fyri sær løtuna, tá bilurin bóltaði runt, umaftur og umaftur. Jógvan greiðir frá, at hann má hava smekkað høvdið í og fingið eitt »blackout«, tí hann minnist einki, næstan frá tí at tey koyrdu framvið Hósvík, og til bilurin fór út í vegjaðaran. Tað er rættuliga ørkymlandi, heldur hann.

Jan fekk blátt merki á herðablaðið, og fleiri blá merki eru at síggja á høgra arminum hjá Mariu. Eisini hava tey øll ilt í herðunum av trygdarbeltinum, men annars eru tey óskadd.

– Eg fari nokk at seta meg aftan fyri róðrið aftur, men tað verður sera varliga, skal eg koyra aftur, sigur Jógvan. Øll trý eru tey samdu um, at tey fara ikki aftur í bil, uttan at spenna trygdarbelti, eisini um tey sita aftanfyri.

### Aftur gerandisdagur

Túrurin á konsert endaði ikki, sum tey trý høvdu ímyndað sær. Síðan sunnumorgunin hava tankar teirra malið um vanlukkuna, og fara helst eisini at gera tað í eina tíð framyvir. Men í dag eru tey bara glað fyri, at tey eru á lívi, og at tey komu frá vanlukkuni uttan mein. Hjá Jan byrjaði gerandisdagurin aftur í morgun, tá hann fór í skúla aftur. Hann er í læru sum rørsmiður og gongur í løtuni á Tekniska Skúla í Havn. Jógvan og Maria valdu bæði at vera heima í dag fyri at koma eitt sindur fyri seg aftur. Maria er donsk men hevur fleiri ferðir verið og arbeitt í Føroyum. Bæði hon og Jógvan arbeiða hjá Hjálpirót.